

FØROYSKT

*Smakkiroyndirnar av føroysku skinkunum vístu, at tað ber til at turka skinku í Føroyum*

*Myndir: Álvur Haraldsen*

# LEITA EFTIR FØROYSKUM SKINKUSMAKKI

**SKINKA** Føroyingar skulu hava sína egnu skinku, og leitað verður eftir rætta smakkinum í hjallum í Norðdepli, Dímun og Bø. Ætlanin er, at fyrstu skinkurnar skulu seljast til jóla næsta ár

Eyðun Klakstein

Hvussu smakkar skinka, sum er turkað í Føroyum?

Tað var spurningurin, sum varð settur á Hotel Føroyum í gjár, tá ið stigtakararnir til føroyska skinkuframleiðslu høvdu boðið umboð fyri fjølmiðlarnar, matkennarar og onnur at smakka skinkuna.

Fimm føroysk sløg vóru á borðinum, og hesar skinkur vóru turkaðar í Norðdepli, Dímun og Bø. Saman við føroysku skinkusløgunum var eisini ein donska skinka frá Munk slaktara í Skagen.

Fólk blindtestaðu skinkurnar og søgdu sína hugsan um, hvussu smakkurin, luktin og liturin var.

Skinkurnar høvdu ymiskan smakk alt eftir, hvat tær høvdu hingið, og hvussu nógv tær vóru saltaðar, og meiningarnar vóru eisini eitt sindur ymiskar um, hvør skinkan var tann besta.

Okkurt slag hevði sterkan smakk og sterkan lukt, meðan onkur skinka var meira mild í smakki og lukti. Eina slagið úr Norðdepli hevði ein feril av røstum smakki, og hon var kanska tann mest eyðkenda í rúgvuni. Spurningurin er bara, um tað skal verða føroyski skinkusmakkurin, ella um skinkan skal vera meiri traditionell.

## Seljast næsta ár

Johan Mortensen er stigtakari til skinkuprojektið, og hann sær stórar møguleikar í føroyskari skinku.

- Tað fyrsta, vit kunnu fegnast um, er, at tað veruliga ber til at turka skinku í Føroyum og fáa hana at smakka væl. Nú skulu vit arbeiða víðari við smakkinum, og í næstum fáa nýggjar skinkur til landið, sum skulu turkast kring landið, sigur Johan Mortensen.

- Gongur tað væl við turkingini, rokna vit við at selja føroyska skinku upp undir jól næsta ár, sigur hann.

Johan Mortensen hugsar ikki bert um føroyska marknaðin. Í longra lagi er vónin, at skinkan úr Føroyum kann útflytast til onnur lond.

- Altjóða skinkumarknaðurin er risastórur, og tí eru spennandi møguleikar í at útflyta føroyska skinku, sigur Johan Mortensen.



ÚTFLUTNINGUR

*- Altjóða skinkumarknaðurin er risastórur, og tí eru spennandi møguleikar í at útflyta føroyska skinku, sigur Johan Mortensen, stigtakari*



TEST

*Fólk blindtestaðu skinkurnar og søgdu sína hugsan um, hvussu smakkurin, lukturin og liturin var*


Keypssamtøkan í Klaksvík

FK í Klaksvík sóknast eftir

***Fólki***

***til nýggja handilin***



**Í sambandi við, at nýggi handilin letur upp fyrst í desember mánaði, sóknast vit eftir fólki til**

***kiosk- og bakeoffdeildina***

**og fólki at standa fyri**

***køli- og frystideildini***

**Okkara krøv:** Tú skalt vera fyrikomandi, kundavinarlig/ur, røkin, hava evni at arbeiða sjálvstøðugt, umframt góð samstarvsevni

**Løn:** Sambært S&K sáttmálanum

Aðrir upplýsingar fáast við at ringja til 455102 ella 225102 og spyrja eftir Jan Gardar

**Umsókn:** Skrivlig umsókn, skal í seinasta lagi mánadagin 25. oktober 2010, sendast til

**FK í Klaksvík**
**Att. Jan Gardar**
**Nólsoyar Pálsgøtu**
**FO-700 Klaksvík**

ella sum teldupostur til: jg@fk.fo